

# 300 umsóknir um bátspláss í Havn

Tað er gravgangur eftir at fáa bátspláss í Havnini og løtuni hevur kommunan einar 300 umsóknir frá fólki, sum vilja hava pláss til bátin.

Jákup Símun Simonsen er formaður í Havnarnevndini hjá Tórshavnar býráð, men hann vildi onki siga.

Men Vagnur Johannesen, nevndarlimur í havnarnevndini sigur, at tað er ein spurningur, hvussu nógvar av hesum umsóknunum eru meintar í álvara.

- Tað kann hugsast, at summi søkja bara fyri at hava eina umsókn liggjandi upp á beráð og tí er tórført at meta um veruliga tørvin.

Hann staðfestir eisini, at hóast ynskiligt hevði verið at gjørt fleiri bátahavnir, eru ongar ítøkiligar ætlanir at seta í verk í næstum.

Men nakrir møguleikar hava verið nevndir. Ein møguleiki er at gera bátahavn í Álakeri og ein annar møguleiki er at gera bátahavn inni á Sundi.

Har eru at kalla óavmarkaðir møguleikar at gera bátahavn.

Men enn er tað ikki komið longur enn á tekniborðið, so har er langt eftir á mál, staðfestir Vagnur Johannesen.

Men vit hava eisini fingið at vita, at ætlanin í Álakeri er steðgað eitt sindur, tí ein kanning skal gerast at vita, hvussu tað fer at ávirka viðurskiftini í havnarlagnum annars at gera ein mola í Álakeri og møguliga eisini leingja molan á Argjum.

Ætlanin á Sundi er heldur ikki komin longur enn á tekniborðið.




## Á framsýning í Brússel

Føroysk luttøka á European Seafood Exposition (ESE)

Tilsamans 20 føroyskar fyritøkur luttóku herfyri í døgunum 3.-5. mai á afturvendandi evropeisku fiskivinnuframsýningini European Seafood Exposition (ESE), ið er størsta framsýning av sínum slagi í heiminum.

Umboð fyri vinnuna siga, at føroyski landabásurin varð væl vitjaður hesar dagarnar.

*Kelda: industry.fo*



## Semja um prentarasáttmálan

Føroya Prentsmiðjufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag skrivaðu fríggjadagin 6. mai undir nýggjan 2-ára sáttmála við Føroya Prentarafelag og Landsfelag Handverkaranna.

Umframt nakrar tillagingar í sáttmálanum hevur semjan við sær eina lønarhækking á 1,25 % hin 1. mai 2011 og 2,37 % hin 1. mai 2012.

Hækkingarnar eru sostatt á sama støði, sum tær semjur, Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt í hesi samráðingarrunduni.

## Í MORGIN

**10/13 °C**



4-9 m/s 6-11 m/s

Gull til stívt andøvsgul av landsynningi. Seinnapartin nakað minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MIKUDAGIN

**8/11 °C**



4-9 m/s 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein struk av suðri, seinnapartin nakað minni vindur av landsynningi. Támut veður og sirm av og á. Hitin millum 8 og 11 stig.

## HÓSDAGIN

**8/11 °C**



3-8 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men nmjørkaflókar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul millum vestan og norða, leygardagin upp í strúk í vindi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga í útnyrðinf og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og grynnist framvegis.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

29. apríl Mánin longst frá jørðini
3. mai Tendring
10. mai Fyrra kvarter
15. mai Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mai | - | 12:01 | 11:01 | 23:24 | 11:16 | 23:39 | 01:38 | 14:01 | 02:38 | 15:01 |
| 10. mai | 00:24 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:24 | 15:01 | 03:24 | 16:01 |
| 11. mai | 01:38 | 14:15 | 00:38 | 13:15 | 00:53 | 13:30 | 03:38 | 16:15 | 04:38 | 17:15 |
| 12. mai | 02:52 | 15:14 | 01:52 | 14:14 | 02:07 | 14:29 | 04:52 | 17:14 | 05:52 | 18:14 |
| 13. mai | 03:37 | 16:00 | 02:37 | 15:00 | 02:52 | 15:15 | 05:37 | 18:00 | 06:37 | 19:00 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mai | 10:16 | 22:39 | 09:16 | 21:39 | - | 12:16 | 00:53 | 13:16 | 11:46 | - | 00:38 | 13:01 |
| 10. mai | 11:16 | 23:53 | 10:16 | 22:53 | 00:39 | 13:16 | 01:39 | 14:16 | 00:09 | 12:46 | 01:24 | 14:01 |
| 11. mai | - | 12:30 | 11:30 | - | 01:53 | 14:30 | 02:53 | 15:30 | 01:23 | 14:00 | 02:38 | 15:15 |
| 12. mai | 01:07 | 13:29 | 00:07 | 12:29 | 03:07 | 15:29 | 04:07 | 16:29 | 02:37 | 14:59 | 03:52 | 16:14 |
| 13. mai | 01:52 | 14:15 | 00:52 | 13:15 | 03:52 | 16:15 | 04:52 | 17:15 | 03:22 | 15:45 | 04:37 | 17:00 |